# Terry ikki við móti Estlandi



Enski landsliðsskiparin, John Terry, hevur verið ivasamur til EM-undankappingardystin ímóti Estlandi leygardagin, og nú er greitt, at Terry ikki verður klárur. Hann hevur fingið ein skaða í vinstra knæ, og sjálvt um hetta ikki er álvarsligt, so verður hann ikki tøkur hjá landsliðsvenjaranum, Steve McClaren, til dystin leygardagin. McClaren hevur tó ikki sent Terry heim, tí í enska hópinum verður vónað, at Terry verður klárur til altavgerandi landsdystin mikudagin, tá England spælir á útivølli ímóti Russlandi.

# Van der Saar úti móti Rumenia

Eitt rættiligt oddabrak verður í EM-undankappingarbólki G leygardagin, tá tey bæði oddaliðini, Rumenia og Holland, bresta saman í Rumenia. Undan dystinum liggja bæði liðini jøvn í oddinum við 20 stigum. Undan dystinum er tó longu nú greitt, at Holland má vera málmannin, Edwin van der Saar, fyri uttan. Tí verður tað helst Ajax-málmaðurin, Maarten Stekelenburg, sum skal verja málið. Afturat van der Saar má Holland eisini vera Robin van Persie, Wesley Sneijder og Mario Melchiot fyri uttan, tí hesir hava allir leikbann til dystin.

# eftir

august, og sum hesa ferð verður undir liðini á Barcelona stjørnuni Lilian Thuram, vísti í gjár á, hvussu teir skulu vinna á Føroyum:

- Vit fara at vinna, men tað verður strevið. Um tað eydnast at okkum at fáa mál innan tíggju minuttir eru farnir, so verður talan um heilt øðrvísi uppgerð. Teir fara at hava tíggju spælarar aftanfyri bóltin. Avbjóðingin hjá okkum verður at finna pláss at spæla á. Tað fer at eydnast okkum, heldur Arsenal stjørnan Gallas.

At Frakland er farið at hugsa um endaspælið næsta summar sæst aftur í, hvørjir vinardystir eru avtalaðir eftir ársskiftið. Frakland skal spæla í Spania 6. februar, 26. mars fer Ongland at vitja í París, og harafturat er avrátt, at Frakland og Rumenia skulu hittast. Enn er ikki avgjørt, nær og hvar dysturin skal spælast.

Franska liðið fer úr Føroyum beinanvegin eftir dystin í morgin. Mikudagin verður uppgerð ímóti Litava í Nantes, og í november skal Frakland spæla í Ukreina.

# Neyðugt við nýggjari verju

**Hóast styrkislistin hjá FIFA sigur, at mótstøðan hevur verið størri undanfarnu ferðirnar, so fer U-21 landsliðið rættuliga at fáa sína søk fyri í morgin ímóti Aserbajan**

U-21

*Jákup Mørk*

Longu klokkan ellivu fyrrapartin í morgin verður fyrsta bríksliðið í U21 landsdystinum ímóti Aserbajan, sum verður spældur á Svangaskarði.

Aserbajan telist ikki millum fremstu fótbóltstjóðirnar í Europa. Á FIFA listanum er a-liðið styrkismett at vera nummar 115. Í hesi EM undankappingini hevur liðið tapt allar tríggjar ferðirnar: 4-1 á útivølli og 2-0 á heimavølli ímóti Grikkalandi og 3-2 í Kroatia.

Kortini man lítil ivi vera um, at talan verður um ivaleysa stóran bita hjá føroyska liðnum at gloypa.

- Teir eru í 3-5-2 uppstilling. Konseptið er, at teir royna seg við longum sendingum av egnari hálvu og fram til teir báðar stóru fremstu menninar, veit annar av føroysku venjarunum, Bill Jacobsen, at siga.

## Stór útskifting

Sammett við undanfarnu ferðirnar hava stórar útskiftingar verið í føroyska hópinum. Serliga meint er tað í verjuni, at Einar Hansen og Jóhan Troest Davidsen eru fluttir upp á a-liðið, at Jónas Þór Næs er leikbannaður, og at Pætur Jørgensen er skaddur. Sam Jacobsen, sum loysti Jóhan Troest Davidsen av seinast, hevur givið avboð.

Longri frammi á vøllinum eru avboð frá Boga Løkin, sum er á námsferð, Christian R. Mouritsen, sum framvegis er skaddur, og Páll M. Joensen sum eisini er skaddur.

Hetta ber við sær, at tað verður neyðugt við so at siga spildurnýggjari verju frammanfyri Gunnar Nielsen. Poul Thomas Dam er tann einasti verjuspælarin, sum frá undanfarnu ferðunum framvegis er tøkur.

- Soleiðis eru treytirnar. Vit mugu dúva upp á teir, sum eru tøkir og hava hug at umboða føðilandið, og vit hava gott mót, tí tað eru framvegis so at siga bara Formulaspælarar, sum fara á vøllin, sigur Bill Jacobsen.



*Heili átta av stuðulsleikarunum á U-21 landsliðnum hava givið avboð til dystin ímóti Aserbajan, og tí verður tað mest sum eitt nýtt lið, sum fer á vøllin á Svangaskarði leygarmorgunin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað kann gott vera, at føroyska liðið fer at síggja umleið soleiðis út í morgin: Gunnar Nielsen – Magnus Olsen, Sven F. Jacobsen, Poul Thomas Dam, Jóhan V. Gunnarsson – Gudmund Nielsen, Kristoffur Jacobsen, Ólavur í Ólavsstovu, Emil Nolsøe Leifsson, Levi Hanssen – Arnbjørn Hansen.

Á beinkinum verða so: Símun Rógvi Hansen, Fritleif í Lambanum, Teitur R. Joensen, Ásbjørn V. Gunnarsson, Leif Niclassen og Frank Poulsen. Eftir mongu skaðarnar og avboðini eru tað seytjan spælarar, sum búgva á sjómansheiminum í Klaksvík og hava vant á Svangaskarði.

Seinnapartin í dag skuldi U-21 landsliðið fara útferð í Kalsoynna, um veðrið var til vildar. Mikudagin klokkan 15 skal landsliðið spæla í Kroatia. Tá verður Jónas Þór Næs tøkur, og tað er eisini ein møguleiki hjá venjarunum at senda boð eftir onkrum, sum í hesi vikuni er við U-19 landsliðnum í Bulgaria.

um. Hetta duga vit, og framgongdin bara síðan í fjør hevur verið sjónlig, hesum viðvíkjandi, sigur Rógvi.

## Liðfelagar

Ein av spælarunum, ið plagar at leggja innfyri til Rógva Jacobsen í álopsstøðu er Jákup á Borg, og teir eru, sum kunnugt, liðfelagar í HB.

Spurdur um tað fer at mangla góð innlegg, sigur Rógvi at tað metir hann ikki, tí tað eru nógvir dugnaligir til at leggja innfyri til hann. Hann leggur afturat at hann er sera fegin um at Rókur av Fløtum Jespersen hevur fingið landsliðsboð.

# Byggja á góðu gongdina

**Árið í fjør var ein katastrofa, men í ár hava vit spælt væl, og tað er tað, vit skulu royna at byggja víðari uppá, sigur væntandi komandi liðskiparin, Jákup Mikkelsen**

LANDSDYSTUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Jákup Mikkelsen hevur verið eykaliðskipari og tikið yvir, tá Óli Johannesen ikki hevur verið við. Nú tvøråmaðurin hevur boðað frá, at hann gevst á landsliðnum, verður tikið sum givið, at landsliðsmálverjin yvirtekur liðskiparabindið permanent.

Men sjálvur sigur Jákup seg ikki hava fingið nakra ábending um, at so verður.

- Tað plaga vit nú heldur ikkia t fáa at vita, fyrr enn beint undan dystinum. So enn veit eg ikki heilt, hvat venjarin ætlar, sigur Jákup Mikkelsen.

Landsliðsmálmaðurin úr Klaksvík er ein av okkara allar royndastu fótbóltsspælarum, og er í hvussu er hin einasti, sum kann vísa á bæði føroyskt og danskt meinstaraheiti. Men slíkir stórdystir, sum tann, ið nú stendur fyri framman, eru altíð líka spennandi.

- Hetta er fjórðu ferð vit møta Fraklandi, og tað er líka spennandi hvørja ferð. Hetta er eitt tað størsta mann í løtuni kann uppliva sum fótbóltsleikari, tó at Italia sjálvandi eisini er spennandi, sigur Jákup Mikkelsen.

## Stig ordiliga gott

Spurdur, hvussu hann metir um verandi undankapping sigur Jákup Mikkelsen, at hetta hevur verið ein løgin kapping.

- Vit spældu illa og blivu hølvaðir av allar teir fyrstu dystirnar. Men síðani hava vit fingið meiri stýr á spælinum, og eg haldi, at vit seinastu dystirnar hava spælt heilt væl, sjálvt um úrslitini ikki hava staðið mát við sjálvt spælið, sigur landsliðsmálmaðurin.

Hann er kortini realistiskur og sigur, at hann væntar ikki, vit fara at vinna dystin.

- Vit skulu konsentrera okkum um góða spælið, vit hava havt seinastu dystirnar, og síðani royna at minimera eitt tap so nógv sum møguligt, sigur Jákup Mikkelsen.

*Hvat er eitt brúkiligt úrslit, og hvat er eitt ordiliga gott úrslit?*

- Eitt ordiliga gott úrslit hevði verið at fingið eitt stig móti fraklendingum. Mann er sjálvandi ongantíð nøgdur við at tapa, men tað kemur eisini ann upp á mátan, mann tapir upp á. Og fleiri av seinastu dystunum hava vit verið beinleiðis óhepnir at tapt. Og tað í sjálvum sær er rættiliga positivt, sigur Jákup Mikkelsen, sum altso væntandi fær handað liðskiparabindið til dystin móti Fraklandi leygardagin.